# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Maskinmeistaraskúlin:

## Maskinistar og maskinmeistarar fingið prógv

**Fríggjadagin 18. juni 2004 fingu 13 maskinistar og 9 maskinmeistarar prógv á Maskinmeistaraskúlanum í Havn**



***Maskinistar.***
*Fremra rað f.v. Sune Dam Frederiksen, Miðvágur, Petur Kári Funding, Hoyvík, Karl Gregersen, Syðrugøta, Magni Johannesen, Vestmanna, Aftara rað f.v. Hjalti Lamhauge, Hoyvík, Jógvan Lützen, Tórshavn, Finnur Nielsen, Klaksvík, Hanus Martin Olsen, Saltnes, Wilhelm Petersen, Húsavík, Thorleif Eyðun Petersen, Klaksvík, Arthur Poulsen, Kambsdalur, Rúni Poulsen, Oyndarfjørður, Tórálvur Poulsen, Tórshavn.*

***Virðislønir:*** *Petur Kári Funding fekk ein kikara frá Føroya Sparikassa og Magni Johannesen fekk barometur og klokku frá P/f Trygd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Maskinmeistarar.***
*Fremra rað f.v. Eyðbjørn Andreasen, Klaksvík, Bárður Jónsson Eliasen, Leirvík, Filip Jónsson Eliasen, Leirvík Aftara rað f.v. Jákup Andrias Hansen, Klaksvík, Jørgin Jacobsen, Leirvík, Niels Pauli Nielsen, Froðba, Jóhan Olsen, Klaksvík, Rúni Petersen, Tórshavn, Óli Eiriksson Simonsen, Tórshavn*

***Virðislønir:*** *Rúni Petersen fekk fototól frá Føroya Banka og Jørgin Jacobsen fekk mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*

***Ídnisvirðisløn (flidspræmie):*** *Jákup Andrias Hansen fekk ur frá A.P. Møller*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 12 næmingar tikið prógv í »Yrkisskeiði innan Landbúnað«

**Fríggjadagin 18. juni 2004 fingu 12 næmingar prógv í »Yrkisskeið innan Landbúnað«. Talan er um eitt skeið, sum Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Búnaðardepilin í Kollafirði skipað fyri**



*Aftara rað f.v. Jákup Skoradal, Klaksvík, Poul Adrian í Homrum, Kollafjørður, Snorri á Bøgarði, Kaldbak, Peder T. Haar, lærari/stjóri, Jákup Bærentsen, lærari, og Poul Müller, lærari*

*Mittasta rað f.v. Jógvan Edmund á Geilini, Svínoy, Tummas Jacobsen, Hvalvík, og Jan Poulsen, Tórshavn*

*Fremra rað f.v. Fritleif Henriksen, kvøldskúlastjóri, Bent Jakobsen, Tórshavn, Malan Patursson, Kirkjubøur, Gunnvá Jónsdóttir, Miðvágur, Torkil Dahl, Tórshavn, og Absalon Hansen, Tórshavn. Eyðstein Jensen, Tórshavn, vantar á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kittan Poulsen 80 ár

Mikudagin 23. juni fyllir mamma okkara, Kittan Poulsen í Fuglafirði, 80 ár. Foreldur hennara vóru Elsebeth Maria og Sigvald Øre. Tey búsettust í Geilini og har vaks mamma upp saman við syskjum sínum - tey vóru Frits, Emma, Karl, sum doyði ungur av sjúku, Esmund og Minna. Mamma er einasta, sum eftir er á lívi av teimum.

Í 1944 giftist hon og pápi okkara, Jógvan Andrias, og tey fluttu inn í barnaheim hansara í Toftum ella í Tronganum, sum tað eisini verður kallað, at búgva. Saman fingu tey fýra børn - Sonja, sum er gift við Haraldi Hammer av Tvøroyri og býr í Syðrugøtu. Kári, sum doyði av krabbameini bert 44 ára gamal í 1991 - hann var ógiftur. Jónsvein, sum er giftur við Káru av Skipanesi og Jógvan Finnur, sum er giftur við Jónvør úr Syðrugøtu. Ommubørnini eru nýggju og langommubørnini tvey. Pápi doyði í 1980.



Gott var at vaksa upp í Tronganum. Í barnaárunum spældu vit ikki sum nú aftanfyri hegnmeskar kringsett av pedagogum. Nei, rásarúm var stórt, næstan óavmarkað – áirnar, fjøran, bøurin og hagin. Bjargingarvestar og fartelefon ókend og fríir sum fuglar runnu vit um tún og teig. Tíðin var tíðin, og hon var góð. Onkuntíð mundi vera buldraligt, men eg minnist einki til, at tú vart ill, bangin ella stúrin.

Í nærum eina fjórðingsøld vaskaði tú í skúlanum. Tað at arbeiða í fiski kendi tú, sum so mangur annar væl. Tú ert vaksin upp í tí tíðini har kúgv, seyður og høsn vóru ein náttúrligur partur av gerandisdegnum. Samfelagsbroytingin hevur verið ovurhonds stór frá torvi til mikroovn!

Inniblíð ert tú og tær dámar væl, tá ið fólk støkka inn á gólvið. Væl dugir tú at greiða frá og hevur eitt sera gott minni. Hetta hevur verið tær hent tey mongu ár, tú hevur verið ættargranskari. Hetta hevur verið eitt frálíkt ítriv hjá tær, og eg veit, at tú hevur hjálpt fleiri at greina ættartalvu sína. Søguáhugin er við árunum styrknaður.

Leingi hevur tú verið limur í pensjonistafelagnum. Eitt óføra gott tiltak tit eldru her og aðra staðni við hava fingið í lag. Tú hevur trivist sera væl í tí umhvørvinum og rósar teimum, sum skipa fyri.

Nú er, sum tey gomlu søgdu, kempualdurin náddur. Í okkara eygum ert tú ikki seinnu árini nógv broytt hvørki í sinn ella skinn. Hóast onkur tregi er, so plagar tú at siga: »Aja, okkurt er, men eg kann ikki klaga.«

Mamma, hjartaliga tillukku á 80 ára degnum og Harrans signing

**Jógvan Finnur**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara kæra dóttir, systir og mostur

**Jensina Hansen**
úr Sørvági

andaðist og varð jarðað.

Hjartans tøkk til tykkum øll í samkomuni í Kedron, ið á ymiskan hátt hjálptu og stuðlaðu okkum í sambandi við jarðarferðina.

Ein serstøk heilsan til heimahjálpina, sum trúliga hjálpti henni til tað seinasta.

Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara hvíldarstað.

Friður verið við minninum um Jensinu.

**Óluvá, Súsanna og Óluvá**

## Minningarorð um Maritu Poulsen

Leygarkvøldið 12. juni komu tey tungu boðini um, at Marita var farin, áleið eitt ár eftir at vit skiltu, at hon var blivin álvarsliga sjúk. Marita var einans 49 ára gomul.

Meginpartin av sínum vaksna arbeiðslívi var Marita í starvi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Marita var útbúgvin farmaceutur, og hesa útbúgving brúkti hon til lítar í sínum starvi sum deildarleiðari á kemisku deild.

Hennara serliga fakliga áhuga høvdu kemiskir greiningarhættir og akkrediteringin av kanningarstovuni. Hennara ágrýtni tryggjaði, at okkara kanningarstova var og er á sama stigi sum vælriknar starvsstovur aðrastaðni. Aftrat starvsstovuarbeiðnum luttók hon í nógvum fakligum samstarvi, bæði í Føroyum og í Norðanlondum.



Júst hetta arbeiðslagið eyðkendi Maritu, hon setti seg sera væl inn í tingini, kannaði eftir hvussu man gjørdi í øðrum Norðanlondum og fekk sett loysnina í verk á ein hátt, sum hóskaði sera væl til føroysk viðurskifti.

Marita var altumfevnandi. Fyri hana merkti tað nógv, at samstarvsfelagarnir høvdu tað gott í sínum yrki. Óansæð hvør trupulleikin var, kundi man altíð venda sær til Maritu. Við sínum stilla sinni skapti hon álit og tryggleika.

Bæði hon og vit hava í eitt ár livað í vónini um, at hon fór at vinna á sjúkuni og aftur gerast ein natúrligur partur av okkara arbeiðsdegi. Soleiðis skuldi ikki ganga.

Okkara tankar leita til Jóhan, Rúna, Fridu og familjuna, sum øll høvdu so ómetaliga stóran týdning fyri hana.

Góða Marita, túsund takk fyri alt tað, tú hevur verið fyri okkum øll somul.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

## PRÓGV

Beinta Lamhauge, Tórshavn, hevur 14. juni 2004 staðið yrkisútbúgvingina Gartnari. Skúlagongdina hevur hon havt á Dansk Center for Jordbrugsuddannelse, Beder, Danmark og lærutíðina á Gróðurstøðini hjá Skógrøkt landsins, lærumeistari Heini Joensen.

Rannvá í Nesinum Olsen hevur tann 18. juni fingið prógv sum grafiskur tilrættisleggjari á Seminarium for Håndværk og design í Nørre Sundby.

## 85 ÁR

Í morgin 24. juni fyllir Paula Jespersen í Trongsivági 85 ár. Hon er burturstødd.

## 80 ÁR

Jokhild Kitta Poulsen fyllir 80 ár 23. juni.

Føðingardagurin verður hildin í Lonini í Fuglafirði mikudagin 23. juni kl. 19.00.

## Dagurin

**23. juni. Paulinus,** deyður ár 431. Franskur munkur, sum gjørdist biskupur í Nola í Italiu, har hann doyði úti við 80 ára gamal